# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Heilsa og røkt – ein merkisdagur

Í dag fingu fyrstu bachelorarnir í sjúkrarøktarfrøði prógvini á stórum hátíðarhaldi í veitlsuhøllini á Landssjúkrahúsinum. Fyri fýra árum síðani varð nýggj útbúgving fyri sjúkrasystrar sett á stovn. Samstundis skiftu sjúkrasystrar navn til sjúkrarøktarfrøðingar. Við hesum var markerað, at her veruliga var talan um eitt skifti. Við nýggju skipanini gjørdist útbúgvingin ein akademisk útbúgving, og tey lesandi fáa heitið BS í sjúkrarøktarfrøði. Limirnir í hesum fakbólki gerast sostatt bachelorar.

Útbúgvingin er við hesum vorðin partur av eini felags europeiskari skipan, ið nevnist Bologna skipanin. Hetta er eitt ES tiltak, ið hevur til endamáls at tryggja, at allar hægri útbúgvingar kunnu samanberast og skullu kunna nýtast á jøvnum føti uttan mun til, hvar í Evropa, tú enn ert staddur. Eisini skal henda skipanin lætta um tilgongdina til víðari lestur, uttan mun til, hvar ein ynskir at lesa.

Dagurin í dag er sostatt ein merkisdagur fyri føroyska útbúgvingarverkið. Dagurin í dag er tó fyrst og fremst ein merkisdagur fyri tey lesandi, ið sum tey fyrstu í Føroyum gerast bachelorar á økinum. Tær, sum fyrr í dag fingu handað prógvini, eru sum tær fyrstu við nýggju útbúgvingini í eini serstøðu. Tær eru í fokus og hesin dagur er framum alt teirra dagur, og vit nýta høvi at ynskja teimum og skúlanum tilukku. Alt bendir á, at skúlin hevur gjørt eitt framúrskarandi arbeiði, og hetta er sera jaligt í eini tíð, har øll høgga í skúlaverkið.

Í triðja lagi er hetta ein merkisdagur fyri føroyska heilsuverkið. Sum gongdin í samfelagnum er um alt Evropa, so tykist sum tørvurin á dygdargóðari heilsurøkt bara gerst størri og størri fyri hvørt ártíggju. Vit leggja okkum allar vesturheimsins lívsstílsjúkur til. Vit gerast øll eldri og eldri, samstundis sum tey, ið skulu røkta okkum, tá vit gerast gomul og sjúk, gerast færri og færri. Hetta er ein tann størsta avbjóðingin í Evropa í dag. Á hesum sum á so mongum øðrum økjum líkjast vit tí framkomna umheiminum.

Við bakgrund í hesari samfelagsstøðu er tað tí í tøkum tíma, at landsins myndugleikar hava nútímansgjørt hesa týdningarmiklu útbúgving. Hetta snýr seg tó ikki bert um røkt men um fyribyrging. Landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur sett fólkaheilsuna í fokus. Í hesum høpi hevur nýggja útbúgvingin stóran týdning, og vónandi fer nýskipaða útbúgvingin at gera munin her. Samantikið er dagurin ein stórur dagur fyri allar partar.

**Sosialurin**

# Skommin er uppaftur størri, Poul

HØGNI HOYDAL



**Rætt hevur Poul Michelsen, tá hann vil hava egna sendistovu í Reykjavík. Men hann gloymir, at Løgmaður hevur skrivað undir uppá, at føroyingar kunnu bert hava sendistovu uttanlands við donskum skeltum og donskum flaggi á skjøldrinum**

Poul Michelsen, tingmaður fyri Fólkaflokkin, vísir í lesarabrævi á, at tað er skomm fyri føroyingar at seta umboðsfólk í ein kjallara á donsku sendistovuni í Reykjavík. Tí heitir Poul á løgmann um at fáa egna føroyska sendistovu í Reykjavík – eins og Útnorðurráðið samtykti í summar.

Í hesum eru vit á einum máli og hava samstarvað væl um ítøkiligt uppskot í Útnorðurráðnum. Hvat kundi verið meiri sjálvsagt og styrkt okkara altjóða førleika, samstarv og samleika?

**Ongin er fullspottaður...**
Men sum Poul Michelsen so vísiliga vísti á í eini lýsing upp undir fólkatingsvalið í februar 2005: "Ongin er fullspottaður fyrr enn hann spottar seg sjálvan". Poul segði tá, at tað kom ikki uppá tal at samtykkja eina uttanríkispolitiska lóg, har Føroyar vórðu lýstar sum "Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne".

Men tríggjar mánaðir seinni, hevði Løgtingið samtykt hesa lóg kortini. Í lógini verða Føroyar staðfestar sum ein samrunnin partur av Danmark. Og lógarfest verður, at føroysk umboðsfólk kunnu bert virka sum donsk embætisfólk og danskir fulltrúar úti í heimi

**Hvat hendi í Fámjin?**
Og longu í mars mánaði 2005, varð skipað fyri stórum fjølmiðlasjóði í Fámjin. Har skrivaði løgmaður undir eitt sonevnt Fámjinsskjal, har eisini varð roynt at billa okkum inn, at talan var um eitt "frambrot".

Men hevur nakar lisið hetta skjal? Hevur Poul lisið tað, ið stendur við smáum? Og visti løgmaður, hvat hann setti sítt navn undir vegna Føroya fólk?

Nei, sannleikin er, at løgmaður hevur skrivað undir fleiri skjøl, ið binda Føroyar – og hann hevur ongantíð samráðst um nakað av hesum. Hevur bert skrivað undir uppá tað, ið mótparturin legði fyri hann. Onki mál ella mið hevur verið, og ongin ætlan um, hvat eru føroysk áhugamál at røkka.

**Skriva undir í blindum**
Til upplýsingar, so er skommin uppaftur størri, enn Poul vil vera við í síni áheitan á løgmann.

Fámjinsskjalið ásetir, at skulu vit hava sendifulltrúar í øðrum londum, so er tað undir hesum treytum:

*"Den stedlige repræsentationschef kan sikre, at Kongeriget Danmarks samlede interesser ikke tilsidesættes." (Undirskjal til Fámjinsskjalið, s.2)*

Løgmaður hevur her skrivað undir uppá, at føroysk sendifólk eru danskir fulltrúar og eru bundin av boðum úr Danmark í sínum dagliga virki, inni á donskum sendistovum.

**Føroysk sendistova við donskum flaggi og skelti**
Men tó so. Ein undantaksregla er. Danski ráðharrin kann geva undantaksloyvi til, at føroysk sendifólk kunnu sita aðrastaðni enn á donsku sendistovuni:

*"De udstationerede medarbejdere har som udgangspunkt kontor på den pågældende repræsentation. På anmodning fra Lagmandens Kontor og med værtslandets og Udenrigsministeriets accept kan medarbejdere dog placeres på en anden adresse." (Undirskjal til Fámjinsskalið, s.2).*

Tað er kanska hesin møguleiki, Poul Michelsen hugsar sær. At Føroyar hava eitt egið høli í Reykjavík. Men so hevur hann neyvan lisið tað, ið stendur skrivað við smáum í eini fótnotu, til ásetingina omanfyri:

*"Det forudsættes at lokalerne i enhver henseende fremtræder som en del af Kongeriget Danmarks repræsentation, også med hensyn til skiltning, flagning m.m." (Fótnota í undirskjali til Fámjinsskjalið, s.2).*

Her hevur løgmaður altso skrivað undir, at vit skulu "søkja um loyvi" til at hava okkara egnu høli. Og skuldi tað verðið játtað, so skal tað í øllum lutum ganga fram, at talan er um "Kongeriget Danmarks repræsentation" við bæði skeltum og fløggum.

**Hvør skommin er størri?**
Spurningurin er sostatt: Hvør skomm er størri?
- At hava føroyingar í kjallaranum á donsku sendistovuni í Reykjavík sum danskar fulltrúar?
- Ella at gjalda fyri egin høli í Reykjavík, har tað stendur á skeltinum: "Kongeriget Danmarks Repræsentation", har danski vápnaskjøldurin hongur á hurðini, og Dannebrog veittrar uttanfyri?

Eg veit í hvussu er, hvat íslendingar fara at halda um okkum, tá teir varnast støðuna. Tað var jú rætt, sum Poul lýsti við fyri tveimum árum síðani: "Ongin er fullspottaður fyrr enn hann spottar seg sjálvan."

Og alt hetta hevur løgmaður skrivað undir uppá – uttan at helst nakar í Føroyum hevur givið sær rættiligt far um tað.

**Eg var mær og vitjaði bróðir**
Okkara ráð eru einføld: Vit uppsiga hesa sonevndu avtalu. Vit keypa ella leiga okkum eina egna sendistovu í Reykjavík – og vit "søkja" ikki danska uttanríkisráðið um nakað, men gera avtalu beinleiðis við íslendsku stjórnina um viðurskiftini. Tá hugsi eg neyvan, at danska stjórnin vil taka eina uppgerð um tað.

Hin møguleikin er, at vit mugu broyta kendu yrkingina hjá Símini av Skarði: "Eg var mær og vitjaði bróðir" til: "Eg spurdi um eg kundi sleppa at vitja bróðir – undir øðrum navni og øðrum flaggi".

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.